tíðindablaðið
# sosialurin

Nr. 58 Hósdagur 23. mars 2000 74. árgangur www.sosialurin.fo Kr. 10,00



## Tók hálvt ár at fáa ein stól

– Eg føli meg øgiliga einsamalla í mínum arbeiði, sigur Ásvør Joensen, sum er stuðul hjá einum brekaðum barni í Havn

**Síða 11**



## Fult eftir einum døgni

Fyrr í vikuni kom Christian í Grótinum søkklaðin á Klaksvík. Við 2.000 tonsum av svartkjafti úr ES-sjógvi

**Síða 2**

# Løgmaður sannføra danskar flokkar

Løgmaður er farin undir at kunna donsku flokkarnar fyri at tryggja stuðul fyri fullveldisætlanini



**Anfinn Kallsberg, løgmaður og Bent Bentsen, formaður í tingbólkinum hjá Konservativa Fólkaflokkinum beint eftir fundin á Christiansbrog klokkan 16:30 í gjár**
Mynd: Føroyska Tíðindastovan

Eingin greið niðurstøða spurdist burtur úr fundinum millum løgmann og tingbólkin hjá Konservativa Fólkaflokkinum í Danmark, sum endaði um hálvgumfýratíðina í gjár.

Hesin fundurin er tann fyrsti, ið skal fáa danskar politikarar at skilja fullveldisætlan landsstýrissins.

Anfinn Kallsberg skal áðrenn næsta samráðingarfundin fyrst í mai tosa við allar danskar flokkar um støðuna.

Løgmaður gjørdi á fundinum nógv burtur úr at greiða Bent Bentsen, formanni, frá ætlanini, men Bent Bentsen stendur fast við síni sjónarmið um, at best er hjá føroyingum at verða verðandi í ríkisfelagsskapinum.

Tað tykist torført at fáa danskar politikarar at gera nakrar serligar viðmerkingar til gongdina í fullveldismálinum júst nú, hóast teir seinastu dagarnar hava verið rættuliga bersøgnir.

Vit hoyra meira um málið í blaðnum í morgin



## KT-vinnan skal mennast

KT-vinnan skal gerast ein tíðandi búskaparligur táttur í føroyska samfelagnum, sigur Ólavur Ellefsen, stjóri á VIT

**KT-síðuarnar**



**Stillads Forskalling**

Er ætlan at keypa ella leiga:
- Forskalling og tilhoyr
- Forskallingsolja & sproytur, klams, konus, avstandsrør v.m.
- Facadestillads
- Trygdarrækverk
- Aluminium rullustillads
- Arbeiðsplatformar

THYSSENKRUPP -HÜNNEBECK

*Leverandørurin til Føroysk byggivirkir í 28 ár*

*Tosið við okkum!*

Sosialurin - 311820

**Kaj Andreasen & Co**

Sandvíkarhjalli - Tel. 315600 - Fax 318008

**PRENT?**

... troyttur av tokutalu og tilboðum, ið ikki halda, spyr ...

Spf.
**HESTPRENT**
Dvørgastígur 7 • 100 Tórshavn
Tlf. 31 45 55 • Fax. 31 80 26
e-mail: hestoy@hestprent.fo